## Samanlegging treyt

Føroya Lærarafelag fer nú at kanna, hvussu umstøðurnar hjá fólkaskúlanum eru kring landið. Magnus Tausen, formaður, sigur við Útvarpið, at umstøðurnar eru ikki tær bestu allastaðni, og at hetta kemst millum annað av verandi skipan, sum býtir ábyrgdina millum land og kommunur. Formaðurin í Lærarafelagnum sigur tó, at skulu kommunurnar yvirtaka fólkaskúlan, er tað ein treyt, at tær kommunalu eindirnar verða størri enn nú.

## Spyr um ferðaseðlar

Á løgtingsfíggjarlógini í ár fingu Strandfaraskip Landsins fimm mió. krónur afturat játtanini til at gera tað bíligari hjá fólki og bilum at ferðast við skipunum hjá stovninum. Nú vil løgtingsmaðurin Gerhard Lognberg hava at vita, um og hvørjar ætlanir eru um at lækka ferðaseðlaprísin. Tí hevur hann spurt landsstýrismannin í innlendismálum, hvussu langt hetta arbeiðið er komið, og nær roknast kann við, at prísl ækkingin kemur í gildi.

Jenis av Rana, floksformaður í Miðflokkinum:

# – 266b hevur brynjað okkum

**Ikki óvæntað fekk málið um 266b umrøðu í formansfrágreiðingini hjá Jenisi av Rana, og formaðurin vísti á, at einki er so ringt, at tað er ikki gott fyri okkurt**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Miðflokkurin hevði landsfund leygardagin, har Jenis av Rana, floksformaður, mælti til at gera fosturtøku til ein sentralan spurning í komandi valstríði*

*Mynd: Leo Poulsen*

Í formansfrágreiðing síni nam Jenis av Rana, floksformaður, fyrst við týdningin av at hava ein kristiligan flokk burturav.

- Royndir vísa, at tað kann geva meining at gera sína meining galdandi í sínum egna flokki, men tað røkkur ikki, tá saman um kemur, segði Jenis av Rana.

Og síðani kom hann inn á málið um 266b, og hvussu limir í etableraðu flokkunum tá »bukkaðu undir«. Hann segði, at tað ikki neyðturviliga vóru tey, ið atkvøddu fyri, sum sviku, men kanska heldur tey, ið ikki atkvøddu ímóti.

- Fyri stuttum síðani vóru eg og ein annar politikari í kjaki um júst hetta evni, at hava ein kristiligan flokk burturav, ella at gera sína ávirkan galdandi í tí flokki, ein er í. Hann argumenteraði væl fyri sínum sjónarmiðum, men tá til stytkkis kom, svíkti hansara flokkur í málinum um 266b, og tað fekk álvarsligar fylgjur fyri viðkomandi, segði Jenis av Rana.

Sambært floksformanninum hjá Miðflokkinum var tað ikki heilt til fánýtis, at soleiðis gekst við tí uppskotinum, tí Jenis metir, at tey nú eru betur brynjað ímóti tí, sum hann væntar, kemur næst. Eitt nú giftarmál í kirkju av samkyntum ella ættleiðing av børnum.

### Lív er lív

Formaðurin í Miðflokkinum nýtti eisini høvið at minna fundarfólkið á, at hann var hin einasti, ið atkvøddi ímóti, tá uppskotið um at privatisera Føroya Banka var fyri á tingi.

Eitt annað av hjartamálum floksins er fosturtøka, og hetta mál fekk sjálvandi eisini rúmd í formansfrágreiðingini. Jenis mælti til, at málið verður ein sentralur spurningur hjá Miðflokkinum í komandi valstríði. Í hesum sambandi nevndi hann støðuna í Kina, har foreldur bert sleppa at fáa eitt barn, og har fosturvatnskanningar nú kunnu avdúka kynið. Um talan er um gentu, verður fosturtøka framd, segði Jenis av Rana.

Familjupolitikkur er annað týðandi mál fyri flokkin, og har er niðurstøðan greið hjá floksformanninum.

- Samgongan hevur ongan familjupolitikk. Viðgerðartrygd, trygd fyri bústaði, trygd á ellisárum og virðilig pensjón eru mál, ið liggja flokkinum nær, men sum samgongan fullkomiliga forsømir, segði Jenis av Rana.

# Miðflokkurin endurstovnar ungdómsfelag

**Formaðurin í endurstovnaða felagnum »Ung í Miðflokkinum« ætlar, at felagið nú skal gerast ein virkin partur av flokkinum**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fyrstur at taka orðið í kjakinum eftir formansfrágreiðingina, var Arni Abrahamsen, sum er formaður í endurstovnaða Ung í Miðflokkinum.

Hann nam við fleiri týðandi mál, fleiri av teimum, sum Jenis hevði frammi, men eisini onnur mál.

Serliga nevndi hann útbúgving og vísti á, at Vinnuháskúlin er við at verða álaður sundur. Hvørki lærarar ella næmingar trívast, sum viðurskiftini eru eftir samanleggingina. Eisini fíltist hann á, at skúlastjórin slapp so snikkaleysir burtur úr framferðarhátti sínum.

Handfaringin av málinum um Miðnámsskúlan í Hovi fekk harðar ábreiðslur, og Arni Abrahamsen nevndi eisini ætlaða Ellisheimið í Vági, sum eftir hansara meting liggur heilt skeivt fyri, tí útsýnið er als ikki til staðar. Eisini eru ætlaðu bygningarnar drignar út, samstundis sum tær eisini eru vorðnar munandi dýrari.

- Tá talan er um at byggja eitt ellisheim er altavgerandi, at tey gomlu hava eitt útsýni, sum tey kunnu frøast yvir. Útsýni yvir havnalag, yvir sjógvin, yvir tað, sum rørir seg í nærumhvørvinum. Hetta er ikki til staðar í ætlaðu bygginini í Vági, vísti undómsformaðurin á.

### Limatalið økist

Eitt annað mál, sum Arni Abrahamsen nam við, er kirkjuskatturin, og tað skilagóða og eisini rættvísa í, at eisini stuðul til vælgerandi endamál átti at kunna dragast frá í skatti. Har hugsaði hann ikki bert um stuðul til samkomurnar.

Formaðurin var annars væl nøgdur við framburðin hjá Ungum í Miðflokkinum eftir endurstovnanina. Hann metti, at síðani eykaaðalfundin í januar hevur felagið fingið á leið 50 limir. Og tey eru sjálvandi til reiðar at gera sítt til at vaksa um flokkin og ikki minst at hjálpa til, tá valið stendur fyri durum.

- Avgjøldini á umhvørvisvinarligum vørum eru eisini alt ov høg og eiga at verða lækkað, ongantíð ov skjótt, segði Arni Abrahamsen á landsfundi Miðfloksins.

Hann nevndi dømið um spariperurnar.

- Um tú kann keypa eina vanliga peru fyri 10 krónur, meðan tilsvarandi spariperan kostar 100 krónur, so er einki at siga til, at fólk velja tað fyrra. Og tað er avgjaldið, sum í flestu førum er orsøkin til dýra prísin, segði Arni Abrahamsen.



*Síðani ungdómsfelagið hjá Miðflokkinum varð endurstovnað í januar, hevur felagið fingið á leið 50 limir, sigur Arni Abrahamsen, formaður*

*Mynd: Leo Poulsen*

Annars lýsti Arni seg sjálvan sum ein »gamal ungur« ið bara bíðaði eftir, at yngri kretir komu framat. So nú er »slagið frítt« hjá ungum í Miðflokkinum, heldur politiski ungdómsformaðurin hjá flokkinum.



*Gott hundrað fólk luttóku í landsfundinum hjá Miðflokkinu, ið varð hildin á Hotel Føroyum*

*Mynd: Leo Poulsen*